# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGNUS@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Superb við dupultari baklúku

**Skoda høvdu heimspremieru av nýggjasta Superb á Geneve Motorshow fyrst í mars. Sum nakað heilt nýtt hevur Superb dupulta baklúku, vanliga viðførislúku sum ein sedan, og stóra baklúku sum ein hatchback ella liftback**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



Nýggi Skoda Superb sær út sum ein sedan, men er í veruleikanum ein kombi



*Superb hevur dupulta baklúku. Vanliga viðførislúku sum ein sedan, og stóra baklúku sum ein hatchback ella liftback*



*b Aftan sær Suberb út sum ein vanligur sedan*

Nýggi Skoda Superb verður ein stórur og rúmligur luksus sedan, sum hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir sum t.d. 9 airbag til verju av bilføraranum og teimum ferðandi í bilinum. Eisini hevur hann knæairbag til bilføraran og síðuairbag aftan.

Sum nakað heilt nýtt hevur nýggi Superb dupulta baklúku. Tað vil siga at hann hevur vanliga viðførislúku, sum ein sedan, og stóra baklúku, sum ein hatchback ella liftback.

Soleiðis at skilja at tað ber til at lata viðførisrúmið upp sum ein vanlig lúka, sum á einum sedan, ella at lata alla baklúkuna upp (við bakrútinum), sum á einum hatchback ella liftback. Skoda nevna hesar funktiónirnar sum ”twindoor”, sum tað av røttum eisini er.

Tveir ymiskir mátar at sleppa til stóra viðførisrúmið, sum er heilar 565 litrar stórt.

Superb verður at fáa við trimum ymiskum TSI-bensinmotorum og trimum TDI dieselmotorum. Størsti bensinmotorurin verður ein 3,6 litra V6 við 260 hk, og størsti dieselmotorurin verður ein 2.0 TDI við Commonrail innspræning og 170 hk. Partikulfiltur verður standard á TDI motorunum.

Superb verður at fáa við eini framkomnari forlyktaskipan, sum automatiskt tillagar seg ferðini á bilinum, umframt at hann eisini verður at fáa við parkeringsassistenti til at bakka bilin upp á pláss. Superb við størstu motorunum kunnu eisini fáast í 4x4 útgávum.

Nýggi Skoda Superb kemur á marknaðin í heyst.



*Skoda Suberb innan*

**Bilradio á Rás2**

**Bilradio verður sent hósdagin millum kl. 16 og 17, og endursent fríggjadag millum kl. 8 og 9, og leygardag kl. 13**



# Nýggi Ibiza á framsýningarferð

Nýggi Seat Ibiza, sum hevur heimspremieru á bilaframsýningini í Madrid tann 22. mai er í hesum døgum at síggja í framsýningarvognum sum koyra kring um í Evropa.

Bilarnir eru at síggja innan fyri glasrútar í sergjørdum framsýningarlastvognum. Um kvøldið er ljós í framsýningarvindeygunum. Seat Ibiza, sum er teknaður av fyrrverandi Lamborghini designaranum Luc Donckerwolke, verður marknaðarførdur á ein heilt øðrvísi hátt, enn vit eru von við her í Evropa.

Framsýningarbilarnir skulu koyra gjø gnum 17 ymisk lond í Evropa í 40 dagar. Steðgað verður í fleiri stórbýum sum t.d. Hamburg, Keypmannahavn og flestu høvuðsstøðum í Evropa.

**mg**

*Nýggi Seat Ibiza er í hesum døgum at síggja í framsýningarvognum sum koyra kring um í Evropa. Her uttan fyri Tivoli í Keypmammahavn*